# smíða víkingaskip



Hanus Jensen, bátasmiður úr Skúvoy, hevur verið við til at byggja Havhingsten, sum kemur til Dublin í dag. Skipið er størsta eftirgerð av víkingaskipi nakrantíð



Hanus Jensen og Ovi Joensen, sáli, skoða Dianu Victoriu, sum Hanus smíðaði. Myndin er frá fyrst í áttatiárunum.

(Mynd; Jan Muller)

- Eg fór niður í 1994, tá onki var at gera í Føroyum. Tá smíðaði eg kappróðrarbát til felagið í Ballerup, sigur Hanus Jensen.

Síðani arbeiddi hann á Middelaldercenteret í meira enn tvey ár, og arbeiddi eitt skifti eisini í Týsklandi, og síðani kom hann til Roskilde.

Hanus Jensen er fastur maður í bátasmiðjuni hjá Roskilde Museum.

- Eg havi í vetur smíðað ein seksæring, og havi eisini fingist við at smíða eitt nýtt bátasnið. Sniðið hevur støði í føroyskum báti, men sniðið er annars nýtt. Hollendingar royna bátin í løtuni og skulu taka støðu til, um teir vilja framleiða hann. Ætlandi skal tilfarið vera alumininum. Hetta er bátur, sum bæði er til sigling og rógving, og hann skal vera lættur at hava við sær, t.d. á biltekjuni, sigur Hanus Jensen.

Hanus Jensen er ikki við í Dublin, nú Havhingsten kemur til staðin, tí onkur skal ansa verkstaði og savnshandli í Roskilde. Men Hanus gleðir seg, til Havhingsten kemur til Roskilde næsta ár, so hann sleppur at síggja stásiliga farið aftur.

## FAKTA

Skipanavn: Havhingsten

Eisini nevnt Havhingsten fra Glendallogh.

Hetta er størsta eftirgerð av víkingaskipi, ið nakrantíð er gjørd.

Upprunaskipið er bygt í Dublin í 1042 og fleiri ár seinni siglt til Danmarkar, har tað varð søkt, saman við fleiri øðrum skipum, fyri at byrgja fyri eini siglirennu í fjørðinum í Roskilde, so fíggindar ikki sluppu inn í fjørðin.

Danska Tjóðarsavnið stóð fyri útgrevstrinum av skipinum í 1962 og var hetta liður í fyrsta fornfrøðiliga útgrevstrinum undir vatni í Danmark.

Endamálið við eftirgerðini og siglingini er at royna skipið viðvíkjandi sjódygd og ferð á teimum leiðum, har víkingaskipini upprunaliga sigldu.

Tuborgfondurin stuðlaði verkætlanini. Frederik Krúnprinsur er protektor fyri siglingarætlanini.

*Keldur: Hanus Jensen (samrøða).*
*National Geographic, Danmark, nr.8, 2007.*
*www.vikingeskibsmuseet.dk*
*Myndasavnið á Sosialinum (Jan Muller)*



Havhingsten á opnum havi. 60-65 mans eru umborð